# TILTØK

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgun kl. 10.30, breyðbróting, barnaansing verður eisini.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 verður ein steðgur og kl. 12 Familjumøti, har Símun Ósá talar.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 16 Jólafest, kl. 18 Møti.

**Fríkirkjan Oasan**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 18 Missiónsmøti, sunnudagsskúlin er farin í jólafrí.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 14 Junior, kl. 18 Møti.
Týsdagin kl. 17 Barnakórið.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag einki ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Einki morgunmøti, men jólafestin byrjar kl. 16.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Jólaaftan kl. 16 Jólagudstænastan.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Frá Ebenezer**
Fríggjadagin kl. 20 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 1645 Sangløta á trappuni uttanfyri Ebenezer við barna- og ungdómskóri, kl. 18 Sangmøti í Ebenezer.
Mánadagin kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin kl. 10.30 Serstakt jólamøti.
www.livdin.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Lars Messerschmidt, prestur í Mariukirkjuni.

**Meinigheitshúsið**
Fríggjadagin kl. 19.30-21.30 Juniorhugni, frá 5. flokki.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Klæmint Tausen, Marjun og tær syngja.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 17 skipa Eyðfinn og Bernhard fyri »Vit syngja jólini inn. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ breyðbróting, Sveinbjørn Jakobsen talar. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Shay Kauffman, ungdómspastor úr USA, jólahugni aftaná.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Helga Abrahamsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Leygarkvøldið kl. 20 Jólahugni í Meinigheitshúsinum. Øll eru vælkomin. Innsavnan til tiltakið.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagin kl. 21 Jólahugni fyri ungdómin.
Sunnudagin kl. 15 Jólafest fyri børnum undir skúlaaldur og kl. 17 fyri børnum í skúlaaldri. Eingin sunnudagsskúli og møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Bønhúsið í Søldarfirði**
Jólafest fyri børnum leygardagin kl. 16.

**Jóla hugnaløta**
Kom á jólahugnaløtu leygarkvøldið 18. des. kl. 20 í lokalunum hjá Arbm. Hæddini í Runavík. Vil tú koma har øll eru líka, so kom á andaliga hugnaløtu hjá ex-misnýtarum. Ongin fordøming. Tey skilja teg, óansæð um tú ert, ella hevur verið misnýtari av alkoholi v.m. Eisini um tú ert ein av teimum avvarðandi. Ella um tú bara ætlar tær at hugna tær í andaligum umhvørvi. Hevur tú ein góðan sang, vilja vit fegin lurta. Bara Av Náði. Sangur, vitnisburður, kaffi v.m. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Lívsins Orð**
Leygardagin kl. 15.30 Jólafest fyri børn.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti – fríur vitnisburður.

**Getsemane, Klaksvík**
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti (jólaavslutning).
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli (jólaavslutning) og kl. 18 Møti við Irdi og Kára Múller Jacobsen. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Betesda, Norðoyggjar**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.

**KFUM og KFUK í Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 22 Opið hús, við luttøka av dramabólkinum.
Leygardagin kl. 16 Jólaveitslan fyri børn upp til 2. flokk, kl. 19 Jólaveitslan fyri børn frá 2. flokki.
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli vegna jólaveitslurnar 18. des.
Kl. 17.30 bønarmøti, kl. 18 Møti v/ Hanus Simonsen, kl. 21 Ungdómsmøti. Sí meira á www.kuff.fo

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti við Hanus Simonsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Innsavnan. Jólafestin fyri børn undir og í skúlaaldri saman við familjuni verður 28. des. kl. 16. Børn framføra jólaleik. Jólamaðurin vitjar. Jólafestin fyri tey vaksnu verður 8. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sands Missiónshús**
Jólatræið við Missiónshúsið verður tendrað sunnudagin kl. 16. Prestur talar, Manskórið syngur. Børnini syngja kendar sangir. Liljan hevur søgu. Innsavnan til sunnudagsskúlaarbeiðið.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin. Sunnukvøldið kl. 18 Hugnaløta við sangi, drekka og rísalamande. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Salem, Tvøroyri**
Sangfundur við felagskórinum hjá brøðrasamkomuni verður leygarkvøldið kl. 20.

**Betania, Porkeri**
Jólaveitsla fyri børn verður leygardagin kl. 15.
Sunnudagin kl. 17 Familjumøti.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin kl. 17 Andakt á Eldrasambýlinum í Vági, Streingjakórið luttekur.
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli vegna jólafrí.
Kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Evangel. møti. Vit syngja jólini inn. Barnakórið v/ Jens og Margrethu syngur. Eyðun Christiansen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 13. desember*
kl. 10-12 Opið hús
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl.
kl. 14-17 Havnaprát, Birgar Fridtleif Johannesen.
kl. 15 Vitjan frá Tilhaldinum av Sangi
*Týsdagin 14. desember*
kl. 10.00–15: Vit syngja (skúlabørnini ganga Lucia). Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00: Jólakonsert. Børn frá musikkskúlanum spæla
*Mikudagin 15. desember*
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Jóladøgurði. Minnist til pakkan til pakkaspælið
kl. 13-17: Opið hús
*Hósdagin 16. desember*
kl. 10.00–12: Opið hús
kl. 12 Røst riv. Tilm. 316491
kl. 15: Vitjan av tveimum violinistum
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 17. desember*
kl. 10.00–13.00: Opið hús
**kl. 13 busstúrur til Æðuvíkar, tí verður Tilhaldið stongt kl. 13.00.**

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrafelagið Nón**
Leygarkvøldið 18. des. fara vit á Casa Blanka til Jólabuffét, tit kunnu tekna tykkum áðrenn 14. des. á tlf. 447718 ella tlf. 449344.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólíkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Dagtilhaldið Fløvi**
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Mánadagin 13. desember:*
Jólafimleikur v/ Jóhannu Troest. Aftaná drekka ganga skótar Lucia
*Týsdagin 14. desember:*
Boccia
*Mikudagin 15. desember:*
Jólalig hugnaløta við jólasálmum og sangum, jólasøgu, jólagreyti og jólapakkum
*Hósdagin 16. desember:*
Jólafrí. Vit byrja aftur mánadagin 3.januar 2005.

**Mint verður á nýggjársháldið 6. januar 2005. Vinarliga sigið frá luttøku áðrenn 15. desember. Til ber at hava gest við.**

*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Eliaskirkjan**
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00
Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 á Glyvrum. Í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

---

0,5 kg. 1 Vektstong og 1 curlstong. (Nakrar skivar eru gummibelagdar). Alt samlað fyri 3500 kr.
*Tlf. 312729/216364*

**INNANDURATRAPPA**
Trappa gjørd úr límtræ 45 mm. Hædd 285 cm. Breidd 105 cm. við platti og tveimum trinum til høgru. Prísur 6.500 kr.
*Tlf. 315511*

**2 FLYMO SLÁIMASKINUR**
Bíliga til sølu
*Tlf. 210174*

**FERÐASEÐIL TIL FØROYA**
Einvegis ferðaseðil frá Keypmannahavn til Føroya tann 29-12-2004 við Atlantsflog til sølu fyri 1000,-
*Ring 441097*

**TIL SØLU**
Pentax Digital kamera, 3.2 megapixel, 3x optisk 200 m, 128 mb ram, tasku go ekstra batteri 2.400,-
*Tlf. 219868*

**NOKIA 7210**
farveskræm, radio og headset 900,-
*Tlf. 219868*

**DYKKERFLASKE**
12L skal trykprøves 500,-
*Tlf. 219868*

**SIEMENS MC60 FARTELEFON**
til sølu fyri 1.000 kr. Einki brúkt, sum nýggj.
*Tlf. 226688*

**VINDEYGA TIL SØLU**
2 H-vindeygu 120 x 120 cm. og 4 H. vindeygu 130 x 120 cm. við termorútum bíliga til sølu.
*Tlf. 503249*

**FROSKMANNAÚTGERÐ TIL SØLU**
15 L fløska, alt uttan vestur.
*Tlf. 370077*